**Setanarrøða í sambandi við ráðstevnu "Vit eldru í vælferðarsamfelagnum"**

Góðu tit øll,

Takk fyri at eg eri boðin at seta hesa áhugaverdu stevnu. Ein tøkk til tykkum fyrireikaðar úr Landsfelag Pensjónista og ein tøkk til tykkum øll í salinum, ið eru komin at lýða á nú sjóneykan verður sett á tey eldru í vælferðarsamfelagnum.

Sum landsstýriskvinna í almannamálum hevur tú tann framíhjárǽtt, at tú hevur møguleikan at hitta nógv fólk, sum á ein ella annan hátt, meira og minni, hava samband við almannaøkið.

Tá eg fyri júst einum ári síðani trein inn á henda fyri mær nýggja pall, setti eg mær fyri, at eg vildi koma út í økini,  út á stovnar og bústaðir og út at vitja avvarðandi feløg , so eg kundi síggja og uppliva hvussu og hvat tær ymsu játtanirnar fara til.

Eg má siga, at henda rundferð hevur givið mær ótrúliga nógvar góðar løtur, sum hava ríka meg og givið mær eitt nógv betri innlit í gerandisdagin hjá millum annað okkara eldru borgarum.

Ein dagin kom ein eldri harri yvir til mín uttanfyri Gamla bókhandil í miðbýnum í Havn. Hann hevði hug at harta okkum politikarar fyri at tosa so niðrandi um pensjónistar. Tá eg spurdi hvat hann hugsaði um, so gjørdi hann greitt, at hann var so harmur um, at hansara ættarlið, sambært bæði journalistum og politikarum, brádliga var vorðin ein byrða fyri samfelagið.

Eg mátti geva honum rætt, at retorikkurin um tey eldru viðhvørt er sera óheppin – ja óvirðiligur á at lýta. Vit hoyra javnan um eldrabylgjuna, ið fer at skola yvir okkum í næstum og sum nærum fer at broyta vælferðarsamfelagið til ókenniligheit.

Hetta er ein óunniligur máti at tosa um tey, ið vóru undan okkum og sum bygdu upp hetta vælferðarsafelagið, sum vit øll eru so góð við og errin av. Og hetta er als ikki í samsvar við ta myndina eg síggi, tá ið eg ferðist runt í landinum og hitti fólk.

Tað sum hesin eldri harrin ikki fekk at hanga saman var, at fleiri av hansara javnaldrum, kvinnur og menn, enn livdu væl og vóru virkin og als ikki sóu seg tyngja nakað samfelag. Og sum, legði aftrat, um gongdin í lívsgóðsku heldur fram, so fóru fleiri og fleiri at vera sum hann á sínum ellisárum.

Og hetta er júst kjarnin, tá ið vit tosa um tey eldru í vælferðarsamfelagnum. Tey eldru eru ikki ein homogenur einlittur bólkur, men ein fjølbroyttur skari við ymiskum tørvi og ymiskari orku.

Vit kunnu ei heldur eintýðugt tosa um ta gráa gullið, tí tá er vandin fyri, at vit ikki taka avbjóðingarnar, sum hóast alt eru, í álvara.

Men vit kunnu tosa um ein eldrastyrk í breiðum høpi, við øllum tí fjølbroytni og margfaldi tey eldru innihalda. Tá varpa vit ljós á tí góðu søguna, sum er, at vit í dag kunnu vænta at liva 25 ár longri enn ættarlið undan okkum.

Og tað eru ikki 25 ár við sjúku og røktartørvi, men - hjá teimum allarflestu - 25 virkin og ressursufull ár.

Tað er á hesar súlur vit eiga at hugsa vælferðarsamfelagið í framtíðini, og tað er millum annað á hesar grundarsteinar vit í løtuni leggja síðstu hond á nýggjan eldrapolitikk.

Tí tað eru fleiri ágóðar við, at vit fáa fleiri eldri. Við aldrinum koma virðismiklar lívsroyndir, fakligt innlit, empati, sosialar kompetansur og arbeiðsligt yvirlit og støðufesti. Tað eru hesar ágóðar vit mugu byggja á, tá ið vit gera meginreglur fyri eldrapolitikkin í Føroyska vælferðasamfelagnum.

Fyri at venda aftur til ræðusøgurnar um eldrabyrðu og eldrabylgju. Hesar søgur gloyma eisini eitt annað týðandi prinsipp í vælferðarsamfelagnum, nevniliga at vælferðarsamfelagið eisini er ein ættarliðssáttmáli. Har hvørt ættarlið letur sítt íkast til næsta ættarlið, og har øll taka ábyrgd fyri at víðarimenna og framtíðartryggja vælferðina.

Hetta merkir tó ikki, at vit bara kunnu lata eyguni aftur og lata til standa. Tí vit hava eina demografiska avbjóðing, sum merkir, at vit gerast lutfalsliga fleiri og fleiri eldri. Legg so aftrat fíggjarligu kreppuna, sum vit framvegis merkja sviðan av og tað støðugu fólkaflytingina.

Tað var millum annað við hesum í huga, at eg í vár setti ein bólk við umboðum frá Landsfelag Pensjónista, fakfeløgunum, kommunum, Almannaverkinum og Almannamálaráðnum at orða ein nýggjan eldrapolitikk.

Bólkurin er so at siga liðugur við sítt arbeiði og ætlanin er, at politikkurin verður almannakunngjørdur tíðliga í desember. Eg skal ikki avdúka ov nógv beint her og nú, men eg vil fegin siga nøkur orð um yvirskipaðu visjónirnar fyri politikkinum.

Yvirskipað skal eldrapolitikkurin taka støði í einkulta borgaranum, hansara sjálvsavgerðarrætti og ávirkan á egin viðurskifti. Politikkurin skal virða, at tey eldru ikki er ein homogenur samfelagsbólkur við einsháttaðum førleikum og tørvi.

Samstundis skal politikkurin skapa karmar fyri at allir eldri borgarar í samfelagnum kunnu liva eitt virkið og innihaldsríkt lív, samstundis sum hond verður tikin um tey, sum hava brúk fyri hjálp.

Hesar aðalreglur merkja í roynd og veru, at vit skulu møta teimum eldru har tey eru. Eru tey eldru framvegis birg at taka arbeiði, tó kanska ikki eitt fulltíðar starv, so skulu tey eggjast til tað. Tað skulu vit gera við at innrætta arbeiðsmarknaðin rúmsáttari og broyta skattligu viðurskiftini soleiðis, at tað eisini í mun til inntøku skal geva meining at taka við arbeiði.

Hevur tú stóran tørv á røkt døgnið runt, so skulu vit veita tær tryggar karmar á røktarheimi. Situr tú eftir í einum ov stórum sethúsum, so fara vit við nýggja bústaðarpolitikkinum í hondini at veita tær tryggan og hóskandi bústað.

Og vit skulu syrgja fyri, at øll í so stóran mun sum gjørligt varðveita eina góða heilsu og harvið møguleikan at vera sjálvbjargin. Soleiðis vinna vit størri lívgóðsku og lívsgleði hjá tí einstaka. Eykavinningurin er, at samfelagið eisini sleppur lættari.

Okkara ættarlið eigur at kýta seg soleiðis, at samfelagið verður til reiðar at taka ímóti teimum avbjóðingum, sum fylgja við einari øðrvísi fólkasamanseting. Tað skylda vit teimum, sum komu undan okkum. Og tað vildi verið okkara íkast til ættarliðið sum kemur.

Við hesum orðum vil eg ynskja tykkum eina góða ráðstevnu. Takk fyri orðið.